# Mugu umhugsa alternativa havn

**Petur Hans Dahl, lærari á Føroya Sjómansskúla, heldur, at nú mugu myndugleikar og reiðarí umhugsa at geva Norrönu eitt annað alternativ sum atløgupláss, so at skiparin ikki verður noyddur at leggja at í ivasomum veðri**

NORRÖNA
*Stefan í Skorini*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

– Tá vindurin er 22-24 metrar um sekundi inn á síðuna á Norrönu, liggur eitt trýst á umleið 100 tons á skipinum, og tá hjálpir eingin skrúva at halda skipinum uppá pláss.

Hetta sigur Petur Hans Dahl, ið er skipsførari, og starvast sum lærari á Føroya Sjómansskúla í Havn.

Hann hevur roknað út, hvussu stórt trýstið er á Norrönu, tá vindurin er so nógvur, sum hann var mikudagin um middagsleitið, tá største ferðamannaskip okkara rendi á land heilar tríggjar ferðir.

Norröna hevur onga bógskrúvu har afturi á skipinum, og tí er torført at leggja skipið í Havn. Óhappið hendi, tá Norröna brádliga fekk nógvan vind inn á síðuna, og tí misti skiparin tamarhaldið á tí stóra farinum, sum bleiv trýst á land. Tá hann so skuldi útaftur av vágni rendi afturendin á skipinum á molan. Tá Norröna so aðru ferð kom innaftur um molan fór hon á land á sama staði við ískeiina.

– Nógv skipskøn undraðust stórliga, tá nýggja Norröna kom til landið, tí at hon hevði ongar bógskrúvur har afturi á skipinum, sigur Petur Hans Dahl. Hann nevnir í sama viðfangi, at Norröna upprunaliga varð bygd til at sigla nógv á Havnina, men hóast tað hevði hon ongar bógskrúvur har afturi á skipinum. Hetta hevði sjálvandi verið eins stórur fyrimunur.

– Hetta var eitt óhapp sum hetta kundi væntast fyrr ella seinni, tí trupulleikin er, at skipið ikki fær stýrt reyvini, tá ongar bógskrúvur eru, sigur lærarin.

Fyri at Norröna kann flyta afturpartin á skipinum, skal hon nýta ferðina, sum hon hevur inneftir vágni til at svinga afturpartin á skipinum.

– Af skade bliver man klog, sigur Petur Hans Dahl, og hann heldur, at myndugleikar og reiðarí avgjørt mugu umhugsa at finna annað atløgupláss, sum kann nýtast í ringum veðri.

### Eingin sjófrágreiðing ásett

Fríggjadagin fyri middag hevði Smyril Line biðið Føroya Rætt um eina sjófrágreiðing, men enn er ikki greitt, nær henda frágreiðing verður.

Annars vórðu boð sent eftir Claire hóskvøldið, sum skal flyta farm av landinum, og gamla Norröna varð eisini boðsend til at røkja farleiðina hjá Smyril Line.

Broytt siglingarætlan verður sett í gildi í dag, leygardagin, og heldur fram til nýggja Norröna kemur í sigling. Gamla Norröna fer at sigla tveir túrar til Danmarkar um vikuna. Hesa tíðina verður ikki siglt til Bergen og Seyðisfjarðar.



*Brimil er komi at hála Norrönu eitt sindur út frá. Omanfyri hanga tvær tyrlur í luftini. Tað kundi sæð út sum um Havnin varð í undantaksstøðu hesa løtuna, og nógv fólk leitaði sær oman at hyggja*




*Her fer Norröna á land molanum, og tað var aðru ferð, at hon bar við land. Fremst á myndini sæst staðið, har fyrsti samanstoyturin hendi*






*Norröna skúmar øgiligt, tá hon roynir at sleppa burturfrá grótkastinum og bryggjuni*



*Ritan var klár at taka ferðafólkini av skipinum*



# Skiparin fekk rætt

**Maðurin á brúnni umborð á Norrönu tann vanlukkuliga hósdagin var suðuroyingurin Ólavur Hovsgarð. Longu í apríl mánaði gjørdi hann í Sosialinum vart við, at atløguviðurskiftini í Havn vóru út av lagi vánalig, og nú vísir tað seg, at hann hevði so sára rætt**

NORRÖNA
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

– Umstøðurnar hjá Norrönu at leggja at í Havn, eru alt ov vánaligar, sigur Ólavur Hovsgarð, sum ikki skilur, at ikki ein betri loysn er funnin.

Soleiðis ljóðaði inngangurin til eina grein í Sosialinum nr. 81 mikudagin tann 30. apríl 2003.

Bylgjurnar gingu høgt, tá Norröna kom til landið á vári 2003. Skiparin fanst hvassliga at atløguviðurskiftunum, og hann legði als ikki fingrarnar ímillum.

– Umstøðurnar at leggja at í Havnini eru út av lagi vánaligar. Tað er rætt og slætt skomm at bjóða Norrönu slíkar usmtøður, segði Ólavur Hovsgarð við Sosialin fyri einum knøppum ári síðani.

Kjakið kyknaði, tá tað tók skiparanum rættiliga langa tíð at leggja at við nýggju Norrönu. Tað kundi taka upp í ein tíma, at fáa skipið uppá pláss.

– Og tað er betri at tað tekur ein tíma at leggja at, heldur enn at Norrøna skal verða standandi á Tinganesi í fleiri dagar. Eg havi gjørt upp við meg sjálvan at míni pappír skulu so ikki skalast fyri at koma eitt sindur skjótari at bryggju, segði skiparin á sinni.

Hann sigur, at sannleikin er, at havnalagið í Havn er rætt og slætt ov lítið, so umstøðurnar verða aldrin góðar, sama hvat so enn verður gjørt.

Ólavur vísti tá á, at alla aðrastaðni, har Norröna siglir, eru atløguviðurskiftini nógv betri enn í Havn, og hann skilir ikki, hví ein onnur loysn ikki er funnin.

Sosialurin vildi fegin fingið orðið á Ólav Hovsgarð til eina viðmerking, men tað hevur ikki eydnast okkum at fingið fatur á honum. Sum skilst fer hann ikki at gera viðmerkingar til hendingina fyrr enn í sjófrágreiðingini í Føroya Rætti.


Sosialurin
Skiparin á Norrønu:
Skomm at bjóða fólki
Umstøðurnar hjá Norrønu at leggja at í Havn, eru alt ov vánaligar, sigur Ólavur Hovsgarð, sum ikki skilur, at ikki ein betri loysn er funnin
SAMFERÐSLA:

*Hetta stóð í Sosialinum tann 30. apríl í fjør*

> ” *Tí er væntandi, at tað verða onkrir túrar um veturin, har tað verður ógvuliga ringt at koma at í havn.*



*Her fer Norröna á land fyrstu ferð. Myndin er tikin úr vindeyganum á blaðhúsinum á Argjum*



*Her eydnast tað endiliga at binda Norrönu við ískeiina*

Jákup Sjatlá á eystara mola:

# Eg varð noyddur at leypa til viks

**Havnarmaðurin, Jákup Sjatlá, var staddur á eystara mola, tá Norrøna á middegi hósdagin bar við molan. Sjóbjargingarstøðin MRCC hevði fult tamarhald á støðuni og teir høvdu eisini verið til reiðar at flyta eina fullsetta Norrönu, um tørvur hevði verið á tí**

NORRÖNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Havnarmaðurin, Jákup Sjatlá, var staddur á eystara mola, tá Norröna bar við á middegi hósdagin. Hann koyrdi bil, tá hann varnaðist, at okkurt var áfatt við Norrönu, tá hon kom inn eftir Havnarvág. Hann fór úr bilinum og leitaði sær yvir á Tinganes at fregnast. Tá legði hann til merkis, at Norröna hevði kós ímóti molanum Hann skjótur at sleppa sær yvir á eystara mola og komin á molan, steig hann úr bilinum. Jákup var kortini skjótur inn aftur í bilin, tí Norröna hevði beinleiðis kós ímóti bilinum.

– Eg varð noyddur at flyta meg í skundi, tí Norröna hevði kós ímóti mær, sigur Jákup Sjatlá.

Hann var skjótur at flyta bilin og stutt eftir bar Norröna við sjálvan molan og hol kom á síðuna. Tá vóru fleiri fólk komin á molan at fregnast og telefonirnar kimaðu fyri boða frá, at nú var hol komið á Norrönu.

### Argir næst

Jákup Sjátlá gjørdist rættiliga skakkur av hendingini. Eftir, at Norröna bar við endan av molanum fór hon við nógvari ferð út úr hylinum og bein kós ímóti Argja landið.

Jákup var tá sannførdur um Norröna eisini fór at bera við Argja landið og tá fóru nógvir tankar gjøgnum høvdið, tí tá kundi støðan gerast rættiliga hættislig. Tíbetur endaði alt í góðum og stutt eftir legði Norröna at á Viðarnesi.

### Høvdu tamarhald

Sjóbjargingarstøðin, MRCC, hevði fult tamarhald á støðuni á Havnarvág hósdagin. Djóni Weihe sigur, at vanliga eru óhapp á sjónum ein marra fyri eina bjargingarstøð, men tíbetur gjørdist støðan aldrin hættislig hósdagin.

Spurdur, um MRCC høvdu verið til reiðar at flyta fólk burtur, um Norröna var fullsett, svarar Djóni Weihe, at hevði talan verið um júst somu støðu, hevði MRCC ikki havt nakrar trupulleikar at flyta fólkini.

– Vit høvdu góðar møguleikar at flyta fólk í dag, (hósdagin, blðm), tí vit kundu flyta frá landi og frá sjósíðuni. Umframt Triton, høvdu vit eisini tyrlu og tí var møguleiki at flyta fólk loftvegis, um neyðugt var við tí, sigur Djóni Weihe.



*Menn eru farnir at kanna tað størra holið miðskeiðis á skipinum, sum Norröna fekk, tá hon rendi á molan*